MENTAMÁLARÁÐIÐ

Tingsýsingarstovan
Undir Glaðsheyggi 14
100 Tórshavn

Dagfesting: 27. oktober 2006
Tygara ref.:
Máltal: 70-53301/061151 -/10

TINGLYSINGARGJALD. Kv/Id:767/3411
DAGUR: 01.11.2006 DKKR. 100,00

**Viðv. matr. nr. 191, 192, 193, 194, 195, 196, 197, 198, 199, 200, 201, 202, 203, 204 og 205. Ómatrikulerað gróthús vestan fyri kirkjugarðin (matr. nr. 207), ið stendur á parti av matr. nr. 126a. Partar av matr. nr. 129a, 208a og 126a í Nólsoy**

Fráøgn um bygningafriðing av úthúsum og umliggjandi friðing á matr. nr. 129a, 208a og 126a í Nólsoy.

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sambært §2 og 3 í Løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðing gjørt av at:

- Gróthús, matr. nr. 191, 192, 193, 194, 195, 196, 197, 198, 199, 200, 201, 202, 203, 204 og 205 verða bygningafriðað eftir § 3, stk 1 í nevndu lóg. Kortskjal vísir friðingina.
- Ómatrikulerað gróthús vestan fyri kirkjugarðin (matr. nr. 207), ið stendur á parti av matr. nr. 126a, verður bygningafriðað eftir § 3 stk. 1 í nevndu lóg. Kortskjal vísir friðingina.
- Umliggjandi friðing verður skipað á partar av matr. nr. 129a, 208a, og 126a eftir § 1, stk. 1 í nevndu lóg. Kortskjal vísur friðingina. Parturin av 129a er økið á Eiðini kring gróthúsini, matr. nr. 192-205, suður til linju, ið er norðurmark hjá matr. nr. 129b. Parturin av 208a er Hørgin og økið kring Hørgarhjall, matr. nr. 191. Friðingarlinjan gongur úr syðra grótkastinum norður móti punkti 8,5 m vestur úr Hørgarhjalli (stoppikrani í vatnveitini) og norður í veg, litra ae, eftir linju, ið er javnfjar ið veg, litra af. Parturin av 126a vestan fyri matr. 207 er týðuliga avmarkaður tríhyrningur í lendinum sunnanfyri veg, litra y. Kortskjal vísir friðingina.

Sambært Løgtingslóg um friðing nr. 11 § 6 inniber friðingin, at ánari ella brúkari av friðlýstum bygningi ella bygningsparti hevur skyldu at halda hann í góðum standi.

Um ætlan er at seta arbeiði í gongd upp á bygningar, sum standa á listanum, og tað gongur út yvir vanligt viðlíkahald, skal ánarin 8 vikur áðrenn arbeiðið verður byrjað, senda Landsstýrinum (Fornminnisnevndini) frásøgn um hetta við lýsing av arbeiðinum.

Umliggjandi øki innanfyri 100 m frá fornminnunum kann verða lagt undir friðing eftir avgerð í Landsstýrinum, sum ger gjøllari friðingar- og skilhaldsreglur fyri økið. Hesar ásetingar eru gjørdar um skilhald í omanfyri nevndu bygningum og økjum:

- 6 NOV 2006

Mentamálaráðið umsitur undirvísingar, granskingar, menta og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO 110 Tórshavn
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

MENTAMÁLARÁÐIÐ

- Aðalreglan fyri bygningafriðingina er, at úthúsini skulu umvælast og viðlíkahaldast undir umsjón av Føroya Fornminnissavni til tess at tryggja, at ongar broytingar verða gjørdar av húsunum, uttan at tær frammanundar eru góðkendar av Fornminnisnevndini. Úthúsini mugu ikki verða niðurtikin.

- Aðalreglan fyri friðað umliggjandi øki er, at nýbygging ikki verður loyvd í økinum. Loyvt verðu tó at gera lendisarbeiði, sum til dømis verjutiltøk í sambandi við uppgang í sjóvarmálanum. Øll bygging í friðaðum øki skal góðkennast av Fornminnisnevndini.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Jógvan á Lakjuni
*Landsstýrismaður*

/Petur Petersen
*Aðalstjóri*


Hörgin
Eiðið
Malarendi
Kirkjutangi
Nólsoyarvík
208a
7m
1,5m
Stoppikrani
191
1:500
Bygningafriting
Friðing av umliggjandi øki
1:1000